Fróðskaparsetur Føroya

10. juli 2008

**Fundarfrágreiðing til setursráðsfund nr. 8/2008**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Hósdagin 10. juli 2008, kl. 13-15.15 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |
| Á fundi: | Jóan Pauli Joensen, rektari<br>Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD<br>Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD<br>Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD<br>Rúna Hjelm, setursskrivari |

**1. Gjøgnumgongd og góðkenning av 7/2008 setursráðsfundi 3. juli 2008.**
Góðkend.

**2. Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

**3. Fíggjarætlan fyri 2009.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070004).
Rúna Hjelm legði fram tølini fyri fíggjarætlanina 2009. Setursráðið var samt um, at í brævinum til MMR viðvíkjandi fíggjarlógini fyri 2009 skulu hesi evni takast upp:

- Nýggj lesandi á hvørjum ári
- Lønir
- Rakstur
- Neyðug dagføring av starvsstovu á NVD
- Arbeiði við at talgilda søvnini á FMD
- Hølistrupulleikarnir á Fróðskaparsetrinum
- Fíggjartørvur í sambandi við samanleggingina av Fróðskaparsetrinum, Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og Læraraskúlanum

Í 2008 er gongd sett á eina menning av Fróðskaparsetri Føroya, og Setursráðið væntar, at henda menning heldur fram í 2009 og 2010.

**4. KT-stýrið á Fróðskaparsetrinum, setursráðið útnevna formann.** (J.nr. (3) 10-01-20070017).
Samstarvspartarnir í KT-samstarvinum hava útnevnt hesar limir í KT-stýrið: Winny í Pætursastovu, Petur Zachariassen, Birni Durhuus og Leon Smith. Setursráðið útnevnir Petur Zachariassen til formann í KT-stýrinum.

**5. Kunning frá deildunum o.ø.:**
**a. Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 19.6.08.** (J.nr. (3) 10-01-2007003).
Tikið til eftirtektar.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |